# Bygdarráðsfundur - stytt gerðabók

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 18.03.2019 kl. 17.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Gunnhild Mortensen |
| | Rúni Thomsen |
| | Sten Spange Larsen |
| | Poul Laust Christiansen (fyri Eir J. Norðberg) |
| Ikki møtt: | Eir J. Norðberg |
| | Magni Bertholdsen |
| | Niels Olaf Eyvindsson |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **Umsókn um byggiloyvi til tak á úthús matr. nr. 106b/105a, Hvalba.**

   Søkt verður um loyvi at leggja tak á úthúsið, sum stendur uppat altan á húsunum matr. nr. 106b/105a.

   **Tekniska nevnd 28.02.2019:**

   Nevndin mælir til at geva byggiloyvi.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi sambært givnum upplýsingum, treytað av, at bygt verður sambært byggisamtyktini og BK17.

2. **Innkomin tilboð uppá hjartastartarar.**

   Claus Olsen, skúlatænari hevur heintað inn tilboð uppá hjartastartarar frá Fønix og Gummibátatænastuni.

   | | | |
   |---|---|---|
   | P/F Fønix: | 6 stk. hjartastartarar + 2 skáp | kr. 92.850,00 v/MVG |
   | Gummibátatænastan: | 6 stk. hjartastartarar + 2 skáp | kr. 95.862,50 v/MVG |

   **Trivnaðarnevndin 14.03.2019:**

   Nevndin mælir til at seta pening av til hetta á fíggjarætlanini 2020.

   **Fíggjarnevndin 18.03.2019:**

   Nevndin mælir til, at eftirlit á hjartastartararnar verður gjørt nú og peningur settur av á fíggjarætlanini 2020 ella 2021. Mælt verður til at keypa ein hjartastartara + skáp frá Gummibátatænastuni.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **<u>Skriv frá bóltfelagnum Royn viðvíkjandi vøllinum.</u>**
Nú bóltfelagið Royn fer undir barna-, ungdóms- og 3. deildarfótbólt, eru viðurskifti við vøllinum, ið tey vilja hava avgreidd, áðrenn byrjað verður.
**Trivnaðarnevndin 14.03.2019:**
Nevndin mælir til at heita á Royn um at fáa girðingina í «seyðahøgan» stand. Tá hetta er gjørt, kann kommunan hjálpa til við at rudda vøllin.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.

4. **<u>Serstøk byggisamtykt fyri Skálamøl</u>.**
Í sambandi við serstaka byggisamtykt fyri Skálamøl, hevur Janus Thomsen spurt Brim Arkitektar um kostnaðin fyri hesa uppgávu. Tíðarnýtsla 30-40 tímar, t.v.s. umleið kr. 15-25.000,-.
**Fíggjarnevndin 18.03.2019:**
Nevndin er samd um at heita á Brim Arkitektar um at gera serstaka byggisamtykt fyri Skálamøl.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

5. **<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.15

Janus Thomsen Gunnhild Mortenesn Rúni Thomsen

Sten Spange Larsen Poul Laust Christiansen